

# Handikapsáttmálin

# læ ttlisin

# tekstur



Ráðið fyri brekað november 2011

Lættlisin tekstur

# Sátt-málin hjá *Sameindu tjóðum* um rættindi hjá fólki, ið bera brek



**Flaggið hjá sam-eindu tjóðum**

## Sam-eindu tjóðir



- *Sam-eindu tjóðir er stovnur, har ið heimsins lond hittast at viðgera og gera avtalur um týðandi mál, sum koma okkum øllum við.*

- *Sam-eindu tjóðir vilja, at øll hava frælsi og javn-rættindi.*

- Sam-eindu tjóðir vilja, at rætt-indi-ni hjá øllum verða vird, og at sama virðing verður sýnd øllum.

## Manna-rættindi



- Manna-rættindi eru rættindi, sum øll hava. Dømi:
  - Øll hava rætt at liva.
  - Øll hava rætt til frælsi.
  - *Øll hava rætt at verða vird.*

- Tí-verri verða manna-rættindini hjá fólki, ið bera brek, við-hvørt brotin.



## Manna-rættinda-sátt-máli



- Sam-eindu tjóðir hava gjørt ein sátt-mála um rættindini hjá fólki, ið bera brek.

- Nógv lond hava lovað at halda henda sátt-málan.

- Ein so-vorðnan sátt-mála nevna vit ein manna-rættinda-sáttmála.

## Sátt-málin



- Her fara vit at við-gera inni-haldið í manna-rættinda-sátt-málanum á lætt-lisnum máli.

- Vit fara at brúka orðið „***sátt-málin***“, tí tað er ein-faldari.

## Inni-hald



- Sátt-málin sigur, hvørji rættindi fólk, ið bera brek, hava.

- Sátt-málin sigur eisini, hvussu vit skulu tryggja, at rættindini hjá fólki, ið bera brek, verða vird í landinum.

- Tú kanst síggja allan sátt-málan á hesum síðum:

- ***Almannamálaráðið:*** www.amr.fo

- ***Ráðið fyri brekað*** **:** www.radidfyribrekad.fo ; vel:  ST-sáttmálin

- ***MBF***: www.mbf.fo ; vel:  Um MBF, vel: ST-sáttmálin



## Í inn-gangi-num til sátt-málan stendur:



- Til at tryggja frið og rætt-vísi í heiminum krevst, at øll hava somu rættindi.

- Fólk, ið bera brek, møta ofta forðingum, ið gera tað trupult hjá teimum at vera við í sam-felagnum.

- Mong fólk, ið bera brek, liva í fá-tækt. Tað má verða broytt.



**Í 1. grein stendur, hvat enda-málið við sátt-málanum er:**



- Sátt-málin skal tryggja, at øll hava somu rættindi.

- Sátt-málin skal tryggja, at øll hava frælsi.

- Sátt-málin skal tryggja, at øll verða vird.

- Sátt-málin sigur, at fólk, ið bera brek, eru ein-stak-lingar, sum eru rørslu-tarnaðir, sálar-liga-brekaðir, menningar-tarnaðir, blindir, sjón-veikir ella hoyrn-veikir.

**Í 2. grein eru út-greiningar:**

- Sam-skifti er ikki bert talu-mál, tí nógvir aðrir sam-skiftis-hættir eru til.



- Tað er mis-munur, tá ið fólk, ið bera brek, verða hildin uttanfyri ella um at-lit ikki verður tikið til brek teirra.



- „***Rímiligar til-lagingar***“ er tað, at ávísar broytingar verða gjørdar at lætta um hjá fólki, ið bera brek.

- Tað eigur at vera havt í huga, at fólk hava ymiskan tørv. Tí eiga allir lutir at verða gjørdir soleiðis, at øll fáa brúkt teir.

**Í 3. grein verður til-skilað hvørjir høvuðs-tættirnir í sátt-málanum eru:**

- Virðing skal verða sýnd øllum, og fólk eiga sjálv at sleppa at taka sínar egnu avgerðir.



- Manna-munur má ikki verða gjørdur á fólki.
- Arbeitt skal verða fyri, at fólk, ið bera brek, kunnu vera við í sam-felagnum.
- Virt skal verða, at fólk eru ymisk.
- Øll eiga at hava somu møgu-leikar.



- Góð at-gongd skal verða tryggjað.



- Menn og kvinnur eiga at hava javn-rættindi.



- Ansast skal eftir rættind-unum hjá børnum, ið bera brek.



**Í 4. grein verður víst á, hvørjar broytingar, ið neyðugar eru at gera:**



- Berast skal so í bandið, at manna-rættindi og frælsi hjá fólki við breki verða vird í gerandis-degnum.

- Ansast skal eftir, at fólk, ið bera brek, ikki verða fyri mis-muni vegna brek sítt.

- Helst mugu lógir broytast og nýggjar sam-tykkjast í sam-bandi við sátt-málan.

- Eisini mugu sið-venja og vanar broytast, sum elva til, at manna-munur verður gjørdur á fólki við breki og øðrum.

- Tey, sum arbeiða við fólki við breki, eiga at verða kunnað um rættindi teirra.

- Fólk, ið bera brek, og áhuga-felags-skapir eiga at fáa møgu-leika at arbeiða saman við teimum, ið skipa poli-tikk og smíða lógir um viður-skifti hjá fólki við breki.

## 5. grein snýr seg um javn-rætt:



- Øll eru á jøvnum føti og hava sama rætt til lógar-vernd
- Manna-munur eigur at verða for-boðin, og ansast skal eftir, at eingin verður fyri mis-muni.
- Tryggjast skal, at fólk, ið bera brek, hava líka góðar møgu-leikar sum tey, ið ikki hava brek.

- Tí hava fólk, ið bera brek, rætt til „***rímiligar til-lagingar***“

  Tað merkir, at tað er ein rættur hjá fólki, ið bera brek, at serligar broytingar verða gjørdar til at lætta teimum um at liva.

**Í 6. grein verða rættindi hjá kvinnum við breki nevnd:**



- Kvinnur og gentur, ið bera brek, krevja ser-ligan stuðul og vernd til at tryggja teimum javnan rætt.

**7. grein snýr seg um at verja børn, ið bera brek:**



- Ansast skal eftir, at børn, ið bera brek, hava sama rætt sum onnur børn.

- Í málum, sum við-víkja børnum, krevur at-lit altíð at verða tikið til, hvat ið er best fyri barnið.

- Børn eiga altíð at sleppa at siga sína meining um mál, sum við-víkja teimum.

- Børn eiga at verða kunnað um henda rætt teirra.

**8. grein snýr seg um, at hugburðurin til fólk við breki má broytast:**



- Bæði í sam-felagnum og í familjum krevur virðingin fyri rættind-unum hjá fólki við breki at verða størri.

- Á-tak má verða gjørt móti teimum for-dómum, sum fólk við breki mugu tola.

- Ansur má vekjast fyri før-leikum og evnum hjá fólki við breki.

- Byrjað eigur at vera við at broyta hug-burðin hjá børnum, og læra tey at virða rættind-ini hjá fólki við breki.

- Fjøl-miðlar eiga at verða eggaðir til at við-gera fólk, ið bera brek, á ja-ligan hátt og við virðing.



## 9. grein snýr seg um at-gongd:



- Broytingar krevja at verða gjørdar so-leiðis, at fólk, ið ber brek, kann liva eitt sjálv-støðugt lív.

- Fólki, ið bera brek, skal verða tryggjað at-gongd til bygningar, um-hvørvi, sam-ferðslu-tól og kunning.

- Tí-skil eiga fólk, ið bera brek, at fáa hjálp eftir tørvi.

- Reglur mugu verða gjørdar um at-gongd fyri øll, og ansast skal eftir, at tær verða hildnar.

- Alt, sum forðar at-gongd, skal verða tikið burtur.

- Leið-beiningar á støðum, sum eru fyri øll, eiga eisini at standa við blinda-skrift og á lætt-lisnum máli.



- Kunning eigur at kunna fáast so bíliga sum yvir-høvur gjør-ligt.

**10. grein snýr seg um rættin til lív:**



- Øll hava sama rætt til at liva.

- Ansað skal verða eftir, at rætturin at liva hjá fólki, ið bera brek, verður virdur.

**11. grein snýr seg um, tá ið neyð-støða tekur seg upp, t.d. ódn, eld-gos ella kríggj:**







- Serligt at-lit má takast til tørvin hjá fólki, ið bera brek, tá ið neyð-støðu-ætlanir verða gjørdar.

**12. grein snýr seg um løg-frøðiligu støðuna hjá fólki, ið bera brek:**



- Ansast má eftir, at fólk, ið ber brek, hevur sama rætt sum onnur fyri lógini.

- Fyri at fólk, ið bera brek, skulu kunna brúka rættindi síni í gerandis-degnum, eiga tey at hava rætt til hjálp eftir tørvi.

- Hjálpin eigur at vera so-leiðis, sum tann, ið ber brek, vil hava hana, og gjørt eigur at verða, sum við-komandi biður um.

- Hjálp eigur bert at verða veitt, um tann, ið ber brek, ikki evnar at røkja síni mál sjálvur.

- Tey, sum veita fólki, ið bera brek, hjálp, eiga at *fylgja á-vísum* reglum. Eftir-lit eigur eisini at vera við teimum.



- Fólk, ið ber brek, hevur sama rætt sum onnur at eiga og arva ognir, ráða sínum penga-viður-skiftum og taka lán.

**13. grein snýr seg um at-gongd til rættar-skipanina:**



- Rættar-skipanin er til dømis politi og dóm-stólar.
- Ansast skal eftir, at fólk, ið bera brek, skal hava somu atgongd sum onnur til rættar-skipanina.
- Ansast skal eftir, tá ið mál verða kannað, at fólk, ið bera brek, hava sama rætt sum onnur.

- Fólk, ið bera brek, eiga at hava somu støðu sum onnur í sam-bandi við við-gerð og kanning av málum.

- Starvs-fólk í rættar-skipanini eiga at verða kunnað um brek og fólk, ið bera brek. Hetta er t.d. galdandi fyri stavs-fólk í fongslum og hjá løgregluni.

**14. grein snýr seg um frælsi og tryggleika:**





- Ansast skal eftir, at fólk, ið ber brek, fær sama rætt til frælsi og trygg-leika sum onnur.

- Frælsið hjá fólki, ið ber brek, má ikki av-markast, bara tí at tey hava brek.

- Um frælsið krevst at verða av-markað hjá fólki, skal tað gerast eftir tí, sum lógin og manna-rættinda-sátt-málar til-skila.

**15. grein snýr seg um for-boð ímóti at gera fólki skaða ella bera seg ó-virði-liga at móti teimum:**



- Tað er bannað at brúka viðgerð ella revsing, sum gera fólki skaða, ella sýna teimum van-virðing.

- Tað er ikki loyvt at gera lækna-kanningar ella vísinda-ligar royndir við fólki, ið bera brek, uttan at tey hava givið sítt sam-tykki til tað.

- Ansast skal serliga eftir, hvussu fólk, ið bera brek, verða við-farin ella revsað. Slíkt má ikki gerast upp á ein máta, sum skaðar, ella soleiðis, at fólk við breki verða óvirði-liga við-farin.

**16. grein er um, at ongin má mis-nýta fólk við breki ella brúka harðskap móti teimum:**



- Fólk, ið bera brek, og familjur teirra eiga at fáa hjálp og tænastu, eitt nú kunning um, hvussu forðast kann fyri harðskapi, og hvar ein kann leita sær hjálp.

- Ansað má verða eftir, at fólk, ið bera brek, ikki verða fyri harð-skapi ella mis-nýtslu. Sama um tað er við hús ella aðra staðni.

- Tí krevst, at eftir-lit er við teirri hjálp og tænastu, sum fólk, ið ber brek, fær.

- Tey, sum hava verið fyri harð-skapi og mis-nýtslu, hava rætt til at fáa stuðul og endur-upp-venjing.

- Lógin má tryggja, at harð-skapur móti fólki, ið bera brek, verður kannaður og meldaður til løgregluna.

**17. grein snýr seg um virðing fyri fólki, ið bera brek, og sjálv-ræðis-rætti (integriteti) teirra:**



- Fólk við breki eiga rætt til, at virðing verður víst teimum og breki teirra, sama um brekið er likamligt ella sálarligt.

**18. grein snýr seg um ferða-frælsi og tað at hoyra til eitt ríki:**



- Fólk, ið bera brek, hava sama rætt sum onnur sjálv at velja, í hvørjum landi tey vilja búgva og hava ríkis-borgara-rætt.

- Fólk, ið bera brek, hava sama rætt sum onnur at fáa pass til at ferðast í út-londum.

- *Fólk, ið bera brek, hava rætt at venda aftur til heim-landið eftir at hava verið uttan-lands.*

- *Børn, ið bera brek, hava, tá ið tey verða fødd, rætt at verða skrá-sett sum ríkis-borgarar, fáa egið navn, kenna foreldur síni og fáa um-sorgan frá teimum.*

**19. grein er um rættin til at liva sjálv-støðugt og at verða tikin upp í sam-felagið:**



- Fólk, ið bera brek, hava sama rætt sum onnur at liva í sam-felagnum. Tey hava eisini sama rætt sum onnur til at velja og vraka.

- Fólk, ið bera brek, eiga at hava møguleika at velja sjálv, hvar tey vilja búgva og saman við hvørjum.

- Fólk, ið bera brek, eiga at fáa fjølbroytta hjálp, eitt nú heima-tænastu og aðra tænastu, sum kann hjálpa teimum at liva í sam-felagnum.

- Ansast skal eftir, at fólk, ið bera brek, ikki gerast einslig í sam-felagnum.

- Allar vanligar tænastur í samfelagnum eiga eisini at vera tøkar hjá fólk við breki og nøkta teirra tørv.

**20. grein snýr seg um ferða-tænastu og at-gongd:**



- Tað má ansast eftir, at fólk við breki kunnu ferðast sjálv-støðug  og trygt, og at tey kunnu ferðast alla staðni.

- Alt, sum hindrar hesum, skal verða burturbeint.

- Tað skal vera so ómakaleyst sum gjørligt hjá fólki, ið bera brek, at ferðast sum tey sjálv vilja, og tá ið tey vilja.

- Tað skal eisini vera so ó-maka-leyst sum gjørligt hjá fólki, ið bera brek, at fáa at-gongd til hjálpar-tól.



- Fólk við breki eiga at fáa góða ferða-tænastu og stuðul frá starvsfólki fyri rímiligan kostnað.

**21. grein snýr seg um frælsi til at siga sína á-skoðan og um at-gongd til upp-lýsingar:**



- Fólk, ið bera brek, hava sama rætt sum onnur at seta á-skoðan-ir sínar fram.

- Ansast skal eftir, at fólk, ið bera brek, hava at-gongd til teir sam-skiftis-hættir, sum hóska tí ein-staka best.

- Fólk, ið bera brek, hava rætt til tær upp-lýsingar, sum eru ætlaðar øllum. Eitt nú tá ið al-menn sam-skifti fara fram. Fyri-tøkur, fjøl-miðlar og onnur, sum veita tænastu, eiga at verða eggjað til at fylgja hesum.

- Upp-lýsingarnar eiga at vera at-geingi-ligar og læ̈ttar at skilja og taka at-lit til tørvin hjá fólki, ið bera brek. Til dømis við blinda-skrift, tekn-máli, ljóð-boðum, lætt-lisnum teksti ella øðrum sam-skiftis-háttum.

## 22. grein snýr seg um virðing fyri privat-lívinum:



- Privat-lív merkir til dømis familju-lív, heima-lív, bræva-skifti ella annað sam-skifti.

- Sama um fólk, ið ber brek, býr á stovni, í egnum bústaði, sam-býli av onkrum slag ella einsa-malt, skal privat-lív teirra ikki órógvast á ó-lóg-ligan hátt.

- Tað er heldur ikki loyvt at mann-minka fólk, ið bera brek, við orðum ella á annan hátt.

- Fólk, ið bera brek, kunnu krevja, at lógin verjir tey móti slíkari mann-minking.

- Persón-ligar upp-lýsingar um fólk, ið bera brek, eru í trúnaði sum hjá øllum øðrum.

## 23. grein snýr seg um um virðing fyri heima-lívi og familju-lívi:



- Fólk, ið bera brek, hava sama rætt sum onnur at varð-veita sítt frukt-bæri, giftast, fáa familju og eiga børn.

- Fólk, ið bera brek, hava krav upp á at fáa stuðul og kunning um familju-viður-skifti og barna-upp-aling.

- Rættindi og skyldur eiga at verða tryggjað hjá fólki, ið bera brek, við-víkjandi løg-ræði, for-eldra-rætti, fíggjar-haldi og ætt-leiðing av børnum.

- Eitt barn kann ikki verða tikið frá foreldrum sínum móti vilja teirra, uttan so at ein lóg-ligur myndug-leiki hevur tikið av-gerð um tað, og bert, um tað er neyðugt til at ansa eftir barninum.

- Børn, ið bera brek, hava krav upp á at vaksa upp í eini familju og hjá sínum fólki. Ber tað ikki til, eigur at verða roynt at fáa onnur í familjuni at taka sær av barninum.

**24. grein snýr seg um um rættin til útbúgving:**




- Fólk, ið bera brek, hava rætt til, at til-lagingar verða gjørdar so-leiðis, at tey fáa javn-bjóðis rætt til útbúgving, uttan at mis-munur verður gjørdur.

- Fólk, ið bera brek, hava rætt til út-búgving á øllum skúla-stigum og eisini eftir-út-búgving, starvs-uppvenjing og vaksna-manna-undir-vísing.

- Ansast skal eftir, at fólk, ið bera brek, verða so væl fyri sum gjørligt bæði fak-liga og sosialt, so at tey kunnu vera fult virkin í sam-felagnum.

- Fólk, ið bera brek, kunnu krevja, at lærarar hava ser-kunn-leika um brek og ser-náms-frøði.

**25. grein snýr seg um rættin til heilsu-tænastu:**



- Fólk, ið bera brek, hava sama rætt sum onnur til at fáa so góða heilsu-tænastu sum gjør-ligt.

- Tað er ikki loyvt at gera mis-mun á fólki, av tí at tað hevur brek.

- Heilsu-tænastan skal vera tøk so nær heim-staði sum gjør-ligt.

- Heilsu-tænastan skal geva til-boð um sjúkra-greining og nøkta tann tørv, sum fólk, ið ber brek, hevur heilt frá barns-beini.

- Tænastan eigur at miða eftir at minka um brekið og forða fyri øllum, sum kann økja um brekið.

- Fólk, ið bera brek, hava sama rætt sum onnur til lívs-tryggingar og heilsu-tryggingar.

- Loyvt er ikki at nokta fólki, ið ber brek, heilsu-tænastu.

## 26. grein snýr seg um før-leika-venjing og endur-upp-venjing:




- Fólk, ið bera brek, hava rætt til tænastu, sum stuðlar upp undir sjálv-bjargni, heilsu, sosialar før-leikar og lut-tøku í sam-felagnum á øllum lívsins økjum.

- So skjótt sum rakt verður við brek, eigur før-leika-venjing at standa við-komandi í boði.

- Fak-fólk skal standa fyri førleika-venjingini undir natúrligum um-støðum og nærhendis heimstaði. Myndug-leikarnir skulu syrgja fyri, at hóskandi tól eru tøk.

## 27. grein snýr seg um arbeiði:



- Fólk, ið bera brek, hava rætt til arbeiði og løn javnbjóðis øllum øðrum.

- Al-menni arbeiðs-marknað-urin skal vera at-komi-ligur hjá fólki, ið bera brek. Til tað krevjast hóskandi til-lagingar. Tryggjast má:

  - At bann er móti mis-muni orsakað av breki.
  - At fólk, ið bera brek, hava krav upp á eitt rími-ligt og kveikj-andi arbeiðs-um-hvørvi.
  - At fólk, ið bera brek, hava javnar møgu-leikar og somu løn fyri sama arbeiði.
  - At arbeiðs-umhvørvið er trygt og ikki heilsu-skaðiligt.
  - At fólk, ið bera brek, eru vard móti á-gangi.
  - At fak-feløgini verja fólk, ið bera brek.

- At fólk, ið bera brek, fáa før-leika-venjing á arbeiðs-plássinum.
- At fólk, ið bera brek, fáa somu møguleikar til at verða flutt í hægri starv sum onnur.
- At fólk, ið bera brek, fáa møguleika at vera í sjálv-støðugari vinnu, eitt nú kunnu stovna fyri-tøkur.
- At fólk, ið bera brek, kunnu fáa arbeiði hjá tí al-menna og komm-unum.
- At ein poli-tikkur verður orðaður og til-tøk sett í verk, sum tryggja alt hetta.
- Ansast má eftir, at fólk, ið bera brek, ikki verða tvingað til at arbeiða.

## 28. grein snýr seg um bú-skapar-liga støðu og sosiala vernd:



- Fólk, ið bera brek, og familjur teirra hava rætt til at fáa mat, klæði og bú-stað eins og øll onnur.

- Fólk, ið bera brek, hava rætt til, at livikor teirra verða bøtt.

- Ansast skal eftir, at fólk, ið bera brek, og familjur teirra fáa sosiala vernd eins og øll onnur.

- Hetta ber í sær:

  - At at-gongd til neyðuga tænastu má verða tryggjað, og at hon ikki kostar ov nógv.
  - At ansast má serliga væl eftir støðuni hjá kvinnum, eldri og familjum, sum hava smá kor.
  - At ansast má eftir, at fólk, ið bera brek, hava somu at-gongd til sosialar í-búðir sum onnur.
  - At fólk, ið bera brek, sum eru komin til aldurs, hava sama rætt til pensjón og aðra tænastu sum onnur.

## 29. grein snýr seg um lut-tøku í politikki og al-mennum lívi:



- Fólk, ið bera brek, hava sama rætt at brúka síni polit-isku rætt-indi sum øll onnur.

- Ansast skal eftir, at fólk, ið bera brek, kunnu verða virkin í poli-tikki og polit-iskum orða-skifti, antin bein-

leiðis ella ó-bein-leiðis gjøgnum eitt tals-fólk.

- Ansast má eftir, at val-rættur og upp-stillingar-rættur til val verða vird. Eitt nú við at:

- Gera val-til-gongd-ina ein-falda og lætt-fati-liga og veita eina tænastu, sum lættir um hjá fólki, ið bera brek.

- Ansa eftir, at fólk, ið bera brek, sleppa at velja loyniliga eftir sínum vilja og sjálv sleppa at velja sær hjálpar-fólk.

- Tryggja, at fólk, ið bera brek, kunnu stovna felags-skapir at stríðast fyri teirra áhuga-málum.

## 30. grein snýr seg um lut-tøku í mentanar-lívi, frítíðar-virk-semi og ítrótti:



- Fólk, ið bera brek, hava sama rætt sum onnur at vera við í mentanar-lívinum. Eitt nú eiga sjón-varps-sendingar, filmir og leik-sýningar og

annað mentanar-tilfar at vera atkomiligt hjá øllum.

- Ansast skal eftir, at fólk, ið bera brek, sleppa inn á støð, har mentanar-til-tøk eru, til dømis leik-hús, søvn, bio-grafar, bókasøvn og kunningar-støð fyri ferðafólk.

- Skapandi og listar-lig evni hjá fólki, ið bera brek, eiga at verða gagn-nýtt, tí tey gera sam-felagið ríkari.

- Fólk, ið bera brek, eiga at verða eggjað til at vera við í frí-tíðar-virk-semi og ítrótti í skúlum.

- Fólk, ið bera brek, eiga at verða eggjað og hjálpt til at vera við í van-ligum ítróttar-greinum.

- Fólk, ið bera brek, eiga eisini at fáa møgu-leikar til at skipa fyri og vera við í ser-ligum í-tróttar-greinum fyri fólk, ið bera brek.

- Ansast skal eftir, at fólk, ið bera brek, fáa at-gongd til ferða-manna-staðir og bygningar, har sum í-tróttar- og frí-tíðar-til-tøk eru.

- Ansast skal eftir, at børn, ið bera brek, sleppa at vera við í frí-tíðar-virk-semi eins væl og onnur.

- Fólk, ið bera brek, kunnu krevja á at fáa at-gongd á-javnt øðrum til at vera uppi-í, tá ið skipað verður fyri ferða-, frí-tíðar- og ítróttar-tiltøkum.

**Grein 31-50 snýr seg um, at ansa eigur at verða eftir, at á-seting-arnar í hesum sátt-mála verða hildnar:**

Upp-lýsingar eiga at verða fingnar til vega, sum kunnu verða við til at fáa sátt-málan framdan í verki.

*Eisini krevur av-gerð at verða tikin um, hvør al-mennur stovnur skal hava eftir-litið við sátt-málanum um hendi í Føroyum.*

*Føroyar skulu senda Sam-eindu tjóðum eina frá-greiðing um, hvat ið er gjørt fyri at fylgja sátt-málanum. Fyrsta frá-greið-ingin skal verða latin eftir tvey ár, síðani fjórða hvørt ár.*

*Um-ráðandi er at sam-starva við áhuga-felags-skapir-nar hjá fólki, ið bera brek, tá ið hesar frá-greiðing-arnar verða skrivaðar. Allir føroy-ingar eiga eisini at kunna fylgja við í arbeið-num at gera frá-greiðing-arnar.*

*Ein sjálv-støðug al-tjóða nevnd skal verða sett á stovn, og hon skal taka ímóti frá-greiðingum úr øllum londum og hava eftir-lit og fylgja við í, hvussu sátt-málin verður út-intur í verki.*

Hesin sátt-málin og støða hansara skal verða tikin upp á tingi hjá sam-eindu tjóðum annað-hvørt ár.

Danmark skrivaði undir sátt-málan tann 30. mars 2007, og tann 13. mai 2009 samtykti Føroya Løgting einmælt, at Føroyar skulu fylgja sátt-málanum.